# Bygnaðarbroytingar í KÍ

**Hóskvøldið var eykaaðalfundur í KÍ, og tá var samtykt at broyta bygnaðin í felagnum, soleiðis at tað nú bert er ein starvsnevnd, meðan fótbólts- og hondbóltsnevndin eru strikaðar**

AÐALFUNDUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við aðalfundin hjá KÍ herfyri var kunngjørt, at felagið fór at kalla inn til eykaaðalfund seinni við tí fyri eyga, at nakrar bygnaðarbroytingar skuldu gerast í felagnum, og hesar vóru fyri á eykaaðalfundinum, sum var hóskvøldið.



*Tað er framvegis Gestur Hovgaard, sum er formaður í KÍ*

**Gestur heldur fram**

Í mong ár hevur KÍ verið skipað á tann hátt, at ein fótbóltsnevnd hevur tikið sær av fótbóltinum, meðan ein hondbóltsnevnd hevur tikið sær av hondbóltinum og Stjørnuni. Nýggju bygnaðarbroytingarnar hava við sær, at nú eru hesar báðar nevndir strikaðar, og ístaðin hevur starvsnevndin ábyrgdina av øllum.

Í starvsnevndini sita so persónar, ið hava ábyrgdina av ávíkavíst fótbóltinum og hondbóltinum.

Umframt bygnaðarbroytingarnar var eisini nevndarval á skránni. Í gomlu starvsnevndini vóru bert tríggir limir umframt ein varalim, men nú telur nýggja starvsnevndin seks limir. Gestur Hovgaard er framvegis formaður. Gamli varaformaðurin Karl Birgir Isaksen stóð fyri vali, og hann bar seg undan afturvali. Nýggjur varaformaður er gamli skrivarin, Nichels Lützen.

Hinir fýra í nevndini eru John William Joensen, ið hevur ábyrgdina av allari kunning til miðlar og onnur. Guttorm Sørensen er nýggjur kassameistari, og so eru tað teir báðir Símun Gullaksen og Kristoffur Ragnarsson, ið hava ábyrgdina av ávíkavíst fótbóltinum og hondbóltinum.

# Javnt í Vági og Gøtu

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| VB-HB | 0-2 | 2-3 | 0-0 | 2-0 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 1-0 | 1-1 | 3-5-2 | 9-8 |
| GÍ-KÍ | 1-2 | 0-1 | 1-3 | 5-1 | 0-0 | 2-1 | 2-2 | 4-2 | 1-2 | 5-1 | 4-2-4 | 21-15 |
| Skála-ÍF | 4-3 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 4-3 |
| B36-EB/S | 4-0 | 1-3 | 7-2 | 5-1 | - | - | - | - | - | - | 3-0-1 | 17-6 |
| NSÍ-TB | - | - | 5-1 | - | - | - | 1-0 | - | - | 2-3 | 2-0-1 | 8-4 |

Tað plagar at ganga javnt á, tá HB vitjar í Vági, og tá KÍ vitjar í Gøtu. Seinastu tvey árini hevur HB tó megnað at tikið alt við sær úr Vági, eftir at hesin dysturin annars líktist einum kompleksið hjá sigursvanda havnarfelagnum. Somuleiðis hevur KÍ seinnu árini havt tikið í Gøtu, har GÍ annars hevði eina at kalla ótakiliga bastión í 90'unum.

Tølini tala, tá hugt verður at, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg í innanhýsis uppgerðunum seinnu árini, men enn er so eingin dystur, sum hevur verið avgjørdur av hagtølum eina.

**-jm**

**formuladeildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 2 Skála | 2 | 1 - 1 - 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 3 KÍ | 2 | 1 - 1 - 0 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 4 EB/Streymur | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 5 HB | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 5 | 0 | 3 |
| 6 NSÍ | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 7 VB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 8 B36 | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 1 | -1 | 1 |
| 9 TB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 5 | -4 | 1 |
| 10 GÍ | 2 | 0 - 0 - 2 | 4 | 6 | -2 | 0 |

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 9 | 9 - 0 - 0 | 740 | 451 | 289 | 31 |
| 2 Stjørnan | 10 | 9 - 0 - 1 | 687 | 460 | 227 | 31 |
| 3 Neistin | 12 | 9 - 0 - 3 | 744 | 544 | 200 | 28 |
| 4 Søljan | 11 | 5 - 0 - 6 | 665 | 584 | 81 | 18 |
| 5 VÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 549 | 559 | -10 | 13 |
| 6 StÍF | 10 | 2 - 0 - 8 | 522 | 643 | -121 | 9 |
| 7 Kyndil | 11 | 3 - 0 - 8 | 484 | 669 | -185 | 9 |
| 8 Tjaldur | 9 | 0 - 0 - 9 | 327 | 808 | -481 | 0 |

VB-HB:

# HB hevur tað ofta trupult í Vági

**Vágbingar hava leingi havt eitt rættuliga gott á HB, tá ið hesir hava vitjað í Vági, men seinnu árini hava havnarmenninir verið omaná**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í HB hevur tað mangan verið tikið til, at útidysturin í Vági er truplasti dysturin á árinum. Havnarmenninir vunnu 2-1 í Vági í 1991, men so gingu tað tólv ár, inntil tað í 2003 aftur eydnaðist at vinna á Eiðinum, tá ið HB vann 3-2, og í fjør vunn greipavinnarnir 2-0.

**Ongar broytingar**

Vágbingar eru svangir eftir stigum undan dystinum móti havnarliðnum sunnudagin. Tvey tey fyrstu umførini hevur samlaða úrslitið bert verið tað eina stigið, sum teir fingu í Klaksvík seinasta sunnudag, tá ið teir leiktu javnleik 1-1.

Í Klaksvík vóru vágbingar rættuliga óheppnir at fáa øll trý stigini við sær suður aftur til Vágs, men klaksvíkingar fingu eitt rættuliga óneyðugt brotsspark stutt fyri leiklok, sum syrgdi fyri javnleikinum.

Hjá VB eru allir mans tøkir til dystin móti HB. Málverjin Bjarni Johansen hevur ligið sjúkur alla vikuna, men í Vági ivast tey ikki í, at hann verður klárur til dystin sunnudagin. Um so er, at Bjarni ikki verður klárur, verður tað helst Heini Jacobsen, ið skal loysa hann av í málinum.

Vágbingar siga, at tað er eingin ivi um, at teir fara eftir øllum trimum stigunum sunnudagin, men at tað verður trupult, tí at HB er altíð væl fyri, og seinnu árini hava havnarmenninir staðið seg væl í Vági.

HB fer til Vágs við sama fólkinum, sum fekk togað ein 2-1 sigur móti NSÍ í hús seinasta sunnudag. Nakrir leikarar eru framvegis skaddir, og eingi útlit er fyri, at nakar av teimum verður við aftur næstu dystirnar.

Vagnur Mohr Mortensen er tó farin at renna, og í HB rokna teir við, at tað gongur ikki so ræðuliga drúgv tíð, áðrenn hann aftur er í hópinum.

Spurningurin er so, hvussu HB fer at skipa liðið til dystin sunnudagin. Í fyrsta dystinum var Páll Mohr Joensen at kalla einsamallur framherji, men í dystinum móti NSÍ seinasta sunnudag vóru tað teir báðir, Jákup á Borg og Tór-Ingar Akselsen, ið myndaðu HB-álopið.

# Argjadrongur venur í Arsenal

**Sum skilst er ungi argjadrongurin, Rógvi Holm, í hesum døgum og venur í enska stórfelagnum Arsenal**

ROYNDARVENJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hesi tíðindi eru ikki váttað, tí tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á hvørki Jákup í Stórustovu, ið vanligani stendur fyri slíkum vitjanum hjá ungum føroyskum fótbóltsspælarum uttanlands, og heldur ikki í Rógva Holm sjálvum.

**Sterkur verjuleikari**

Rógvi Holm er 15 ára gamal og spælir í miðverjuni á dreingjaliðnum hjá AB, sum er felagið, ið hann altíð hevur spælt við. Pápi Rógva, Sjúrður, er eisini kendur ítróttarmaður, sum í mong ár var fastur fúsur á besta liðnum hjá VÍF og føroyska hondbóltslandsliðnum í áttati og nítiárunum.

Sum skilst fór Rógvi saman við foreldrunum og Jákupi í Stórustovu til London hósdagin, og vanligt er, at slík venjingaruppihald eru í umleið eina viku.

Tað er ikki óvanligt, at ungir føroyskir fótbóltsspælarar fara í europeisk feløg at venja fyri at uppliva, hvussu tað er í slíkum feløgum. Tað er ikki altíð, at tað er við einum sáttmála fyri eyga, at slík venjingaruppihald eru fingin í lag, og tí er ikki vist, at uppihaldið hjá Rógva í Arsenal hevur nakað við ein møguligan sáttmála at gera.

Vit fara at royna at fáa fatur á antin Rógva ella Jákupi í Stórustovu næstu dagarnar fyri at frætta nærri um vitjanina hjá unga argjadronginum í enska stórfelagnum.